# Hetta er ikki bert ein lýsing. Hetta er ein upplýsing

**Okkara lýsingaráðgevi sigur, at fólk tíma ikki at lesa lýsingar við nógvum teksti. Tað trúgva vit ikki uppá. So vit fara at siga tær eitt sindur um okkum, okkara vørur og um framleiðslu av reingerðarevnum sum heild.**







Fyrst og fremst hetta: tú kanst kenna teg fullvísan í, at reingerðarevni okkara eru ment við serligum atliti til føroyska umhvørvið. Til dømis er **einki kálk** í føroyska kranavatninum. Okkara vatn kemur nevniliga úr erva sum regn, - ikki úr jørðini. **Tessvegna nýta vit heldur ikki evni til at bróta niður kálk við í húsarhaldsvørum okkara, og tað er náttúran fegin um. Jú færri kemisk evni, vit lata út í umhørvið, jú betri, halda vit - og náttúran.** Hesi evni finnast harafturímóti vanliga í reingerðarevnum, sum eru framleidd í londunum kring okkum, har kálk er í vatninum.



Tað er ein veruleiki, at øll reingerðarevni innihalda virkin evni. Um tey skulu loysa sína vaskiuppgávu, væl at merkja. Vit leggja alstóran dent á at fara væl um okkara umhvørvi **við at nýta lætt niðurbrótilig, natúrlig evni úr plantu-oljum í framleiðsluni av okkara húsarhaldsvørum**.



Vantandi lóggáva í Føroyum á økinum hevur við sær, at eingi krøv verða sett innihaldinum í lokalt framleiddum ella innfluttum reingerðarevnum. Tessvegna hava vit **av okkara eintingum** avgjørt at fylgja **donskum og ES-lógum og reglugerðum á økinum**. Kemilux hevur **egna starvsstovu/laboratorium**, sum í samstarvi við altjóða serkunnleika hevur dagliga eftirlitið við, at allar reglur verða fylgdar. Kemilux framleiðir samsvarandi **ISO 9001:2000 skipanini**. Strongu krøvini, sum vit seta okkum sjálvum, hava millum annað havt við sær, at Kemilux er **góðkendur veitari til sera kravmiklu oljuvinnuna**.






**Og so eru vit eisini grøn**
Allar húsarhaldssápur okkara, sum tú sært á handilshillunum, lúka treytirnar fyri **grønu merkingini**, sum danska **Sundhedsstyrelsen** viðmælir, og vit fara í næstum at merkja vørur okkara samsvarandi. Viðvíkjandi allergi eru vit fegin um at kunngera, **at eingin av okkara sápum inniheldur evni, sum standa á allergilistanum hjá ES**.

So tá tú keypir Kemilux húsarhaldsvørur, **keypir tú altíð grønt og allergivinarligt**.











*KEMILUX framleiðir samsvarandi ISO 9001:2000 skipanini*

*KEMILUX er góðkendur veitari til oljuvinnuna*

*- tín trygd fyri, at vøran er í lagi*

**KEMILUX**

tlf. 350830 - www.kemilux.fo